# Til læraran




## Arne Svingen

Ein himmal fullur av skýggjum

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2023

Nám 2024
Gunvá Magnussen og
Lis G. í Jákupsstovu

## Um bókina

Hvat gert tú, tá ið tú hevur verið hjá læknanum og fingið verðins ringastu tíðindi?

Henrik er 11 ára gamal og hevur júst fingið verðsins ringastu tíðindi frá læknanum. Hann hevur ikki nógva tíð eftir at liva í, og hann vil ikki spilla hana burtur. Tá ið Henrik fær boðini frá læknanum, fær hann sær eitt nýtt endamál. Hann vil bjarga heiminum!

Sjúkrastøðan hjá honum er ein nógv minni trupulleika enn sjúkan, sum hevur rakt heimin. Fólk eru ikki góð við umhvørvið, og tað má hann gera nakað við. Hann fer í holt við størsta og villasta bjargingarátakið nakrantíð.

Henrik fær Sofíu, dóttir Vibeku forsætisráðharran, við uppá ætlanina. Kanska fær hann ávirkað forsætisráðharran so mikið, at tað ger mun. Ferðin er ikki bara spennandi, men ein ógloymandi ferð, sum kann broyta gamla vanahugsan um umhvørvið. Bókin er stuttlig og viðkomandi. Evnini eru umhvørvi og náttúra og at hava foreldur, sum ikki liva saman.



© Nám

## Um rithøvundin

Arne Svingen er norskur rithøvundur, føddur 10. juli 1967. Hann er ein av virknastu rithøvundunum í Noregi og hevur skrivað yvir 100 bøkur.
Arne Svingen hevur starvast sum journalistur á m.a. Arbeiderbladet. Hann hevur arbeitt við spælifilmi í New York. Hann er í dag sera virkin at vitja skúlar, har hann tosar um at lesa, um bøkur sínar og heldur skriviskeið. Hann hevur lagt sera nógv arbeiði í at fáa ungdóm at lesa – kanska serliga dreingir.
Fyrsta bók hansara, skaldsøgan *Handlingens mann*, kom út í 1999, sama ár kom barnabókin *Flekken*.
Fyrsta ungdómsskaldsøgan, *Karisma*, kom út í 2002. *Svart fílabein* kom út á norskum í 2005. Hon varð heiðrað við Bragerprísinum sama ár. Svart fílabein kom út á føroyskum í 2008 og fleiri aðrar av hansara barnabókum eru týddar til føroyskt.

Í 2019 fekk Arne Svingen Bokslukerprisen fyri bókina *Ein himmal fullur av skýggjum*. 45.000 børn atkvøddu fyri bókini.

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar eru ætlaðar 5. – 6. flokki. Gott hugskot er at hava eitt hefti at skriva í, tað kann væl vera heftið, sum næmingarnir brúka í føroyskum. Tey kunnu eisini gera eina mappu á telduni.

Uppgávurnar eru bygdar eftir leistinum *áðrenn vit lesa, meðan vit lesa* og *tá ið vit hava lisið,* har mest dentur er lagdur á arbeiðið, tá ið bókin er lisin.

Flestu uppgávurnar eru hugsaðar sum bólkauppgávur, men tær kunnu eisini gerast einsæris.

Tað er altíð eitt gott hugskot, at lærarin lesur ein part av bókini fyri næmingunum, serliga fyri at fáa glið á, so at næmingarnir hava hug at lesa víðari. Vit meta, at tað tekur áleið 15 – 20 undirvísingartímar at koma ígjøgnum bók og uppgávur.


© Nám

# Áðrenn vit lesa

### Tosið um bókina

Hyggið at for- og baksíðu, tosið um heitið og lesið tekstin, sum stendur á baksíðuni.

Tosið um, hvat tit vænta av bókini.

Hesir spurningarnir kunnu fáa glið á samrøðuna:

- Hvat síggja tit á forsíðuni?
- Hvat halda tit, at bókin man vera um?
- Hvussu vænta tit, at huglagið verður í bókini? Spenningur, óhugni, drama …?
- Hvat fara tit at hugsa um, tá ið tit lesa heitið?

# Meðan vit lesa

### Viðmerkið

Meðan tit lesa skulu tit viðmerkja

- orð, tit ikki skilja
- okkurt, sum tit undrast yvir
- okkurt, sum er serligt við tekstinum.

Her er gott hjá næmingunum at hava eitt hefti at skriva í. Arbeiðast kann við viðmerkingunum hjá næmingunum so hvørt tit lesa partarnar. Eitt hugskot er at lata næmingarnar sita saman tveir og tveir og arbeiða við viðmerkingunum, síðan kunnu tit í felag tosa um, hvat næmingarnir hava tosað um.

### Yvirskriftir

17 partar eru í bókini, allir hava heiti. So hvørt sum tit lesa partarnar, kunnu tit tosa um innihaldið, og um hvussu heitið hóskar til partin.

Eitt hugskot er at skriva stutt um hvønn partin. Hetta kann gera tað lættari hjá næmingunum at arbeiða við bókini, tá ið tey eru liðug at lesa. Partarinir eita:

1. Ein ótrúliga góður dagur
2. Tað góða við einum bardaga
3. Ein bók til alt
4. Sonur Hóttanar-Hans
5. Herligar vanlukkur
6. Delta er á veg
7. Fólk eru býtt
8. Ein maður við munnbitum
9. Tápulingar og onnur umhvørvissvín
10. Ikki øll tíma at kasta bólt
11. Eitt gott tak um hálsin
12. Við høvdinum á grillini
13. Sannleikin er dapur
14. Tá ið vit eru blivin vaksin, er tað ov seint
15. Punkterað dekk og uppblástar typur
16. Eitt uppøst hav av menniskjum
17. Ein ótrúliga góður dagur (2. partur)



© Nám

# Tá ið vit hava lisið

**Samvirkisnám (Cooperative learning)**

Nú tá ið bókin er lisin, er gott at fáa næmingarnar at tosa eitt sindur um hana. Her er samvirkisnám eitt fínt amboð.

Næmingarnir gera ein – tveir spurningar hvør eftir førimuni. Síðan ganga tey runt í flokkinum og spyrja hvønn annan spurningarnar. Minnist til, at spurningarnir skulu helst ikki kunna svarast við ja ella nei. Spyrjarin skal vita svarið. Um tann spurdi ikki dugir at svara, skal spyrjarin fáa samrøðu í lag so komið verður fram til eitt svar.

Mett verður, at spurnarrundan tekur umleið hálvan tíma, 10 min. at gera spurningar og 15 at spyrja og svara.

**Persónslýsingar**

Gerið persónslýsingar av Henriki, Bredo og Sofíu. Minnist til at hugsa bæði um útsjónd og verumáta.

Áðrenn farið verður í gongd við at lesa bókina, skulu næmingarnir fáa at vita, at tey skulu viðmerkja síðutalið har eitthvørt er skrivað um Henrik, Bredo og Sofíu. Tá verður lættari at gera persónslýsingar.

Møguleiki er eisini at velja at elta ein av persónunum, persónarnir kunnu verða býttir ímillum næmingarnar at elta.

**Arbeiðið í bólkum**

Tosið saman í smærri bólkum.

- Hví heldur tú, at Henrik vil bjarga verðini, áðrenn hann doyr?
- Hóskar heitið til bókina? Greið frá.

Set næmingarnar í smærri bólkar at tosa saman um spurningarnar í einar 10 min. Havið floksprát.

**Samd/ósamd**

Næmingarnir stilla seg í miðjuna í skúlastovuni. Spyr spurningar, har tey antin eru samd ella ósamd, eru tey samd fara tey til vinstru og ósamd fara tey til høgru.

Tað er eitt gott hugskot at tryggja sær at næmingarnir skilja, hvussu teir skulu gera. Byrja t.d. við at siga, “Summarið er deiligt”, her eru tey flestu kanska samd. Royn síðan við onkrum øðrum, sum tey flestu hava eina meining um “Ræstur fiskur smakkar væl”, her eru kanska ymiskar meiningar. So er klárt at byrja uppá spurningarnar.

- Er tað í lagi, at Henrik ikki gongur í skúla, tí at hann er sjúkur?


© Nám

- Henrik og Bredo berjast ofta, er tað í lagi?
- Søgan vísir á, at tá ið vit keypa inn er nærum alt pakkað inn í plast, og at tað er ikki rætt. Eru tit samd ella ósamd?
- Henrik sigur fleiri ferðir, at hann er ikki ein klemmari – at hann klemmast ikki. Er tað í lagi at hann ikki vil klemmast?
- Henrik vil ikki hava, at pápin kemur at vitja, tí hann hugsar um dálkingina av ferðing. Samd/ósamd?
- Henrik fer ikki til lækna, tí at hann hevur ikki tíð, er tað í lagi? S. 98
- Sofía hjálpir til, so mamman verður útstillað í náttblusu, er henda støðan í lagi? 80-85, 92-97
- Ein himmal fullur av skýggjum er ein góð bók, samd ella ósamd?

Her eru nøkur uppskot um støður, men til ber eisini at finna aðrar støður.

Ein onnur útgáva av samd/ósamd kann vera at gera ein striku í flokshølinum, antin við at klistra eina striku ella leggja eitt hoppiband á gólvið. Strikan er ein samd/ósamd ásur.

Út frá strikuni kunnu næmingarnir vísa, um teir eru meira ella minni samdir/ósamdir. Minni samd/ósamd er nærri strikuni og meira samd/ósamd er longur vekk frá strikuni.

Lærarin kann velja at spyrja næmingarnar, hví teir eru samdir/ósamdir, og biðja teir grundgeva.

**Hugskot**

Lesið s. 39 – 41. Í hesum stutta brotinum hugsar Henrik nógv um hugskot, og tað at fáa hugskot.

- Tosið saman um hugskotini hjá Henriki.
- Fáa tit onkuntíð hugskot, hvat gera tit við hugskotini, sum tit fáa?

Næmingarnir skulu lesa brotið á s. 39-41 og hugleiða eitt sindur um hugskotini hjá Henriki. Lat tey arbeiða í smærri bólkum í einar 10 min.

Møguliga kunnu tit taka saman um í flokspráti.

**Skriva røðu**

Skrivið røðuna, sum Henrik skal halda í ST. Gerið tykkum ómak við innihaldi og máli. Haldið røðuna fyri flokkinum.

Hetta kann gerast sum bólkaarbeiði, men um onkur næmingur megnar hetta einsamallur, so er hetta eisini ein fín einstaklingauppgáva.

Røðan kann eisini gerast á enskum í samstarvi við enskt.


© Nám

**Heimsmál 13**

Um tit hava tíð og áhuga kunnu tit arbeiða við heimsmáli 13, tá ið tit hava lisið *Ein himmal fullur av skýggjum.*




Trettanda heimsmálið er um, at tálma veðurlagsbroytingum.

https://snar.fo/heimsmal/17-heimsmal/13-vedurlagsatoek-1



© Nám